## Færri ríkfólk í Bretlandi

Hóast russarin Roman Abramovich hevur mist einar 40 milliardir krónur í fíggjarkreppuni, er hann framvegis næstríkasti maður í Bretlandi, har hann býr. Hann hevur tó onga neyð, tí sambært Reuters eigur hann einar 60 milliardir krónur eftir. Tann einasti, sum eigur meiri, er stálkongurin Lakshmi Mittal. Hann hevur eisini mist ovurhonds nógvar pengar av fíggjarkreppuni, men situr kortini enn á ovastu rókini. Times skrivar, at í dag eru 40 fólk í Bretlandi, sum eiga meiri enn eina milliard pund. Fyri einum ári síðani vóru tey 75 í tali, so fíggjarkreppan hevur sett síni spor.



## Ung drekka ov illa

Altsamt fleiri ungfólk í Grønlandi hava trupulleikar við rúsdrekka, og nú hava fyribyrgingarráðgevarnir í býnum Ilulissat gjørt av at taka stig til at venda gongdini. Sum tann fyrsti býurin í Grønlandi bjóðar Ilullissat ungum viðgerð ímóti rúsdrekkamisnýtslu, og ætlanin er at skipa eina viðgerðarstøð, sum skal hava eitt sokallað ferðalið av ráðgevum. Í hesum døgum er eitt serligt tiltak í Grønlandi, og málið er, at vika 18 skal vera alkoholfrí. Helga Nielsen, fyribyrgingarráðgevi og stigtakari til ta alkoholfríu vikuna, sigur við KNR, at børn og ung, sum byrja tíðliga at drekka og at roykja hasj, hava ofta trupulleikar heima við hús.

# WHO hækkar tilbúgvingarstigið

**Á einum stiga frá eitt til seks er svínakrím nú á stig 4, sigur heimsheilsustovnurin WHO. Hetta merkir at talan er um vaksandi smittu millum menniskju**

SVÍNAKRÍM

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Talan er ikki um eina pandemi, ella heimsumfatandi farsótt. Men vandamikla svínakrímið er nú ein so álvarsom hóttan, at heimsheilsustovnurin WHO í gjárkvøldið hækkaði tilbúgvingarstigið frá 3 til 4. Hetta vátta keldur í Geneve fyri tíðindastovuni Reuters.

Stig fýra og stig fimm merkja, at sjúkan breiðir seg frá menniskja til menniskja. Til tess at røkka hægsta tilbúgvingarstiginum, skulu størri útbrot verða staðfest í fleiri ymiskum økjum í heiminum.

Enn er tað bara í Meksiko, at talan hevur verið um eitt størri útbrot. Her eru fyribils 153 hildin verða deyð av virusinum, meðan uppaftur 1600 møguliga eru fongd.



*Óttin veksur samstundis sum tilbúgvingarstigið verður hækkað. Kring allan heimin eru tilbúgvingar til reiðar og fyribyrgjandi tiltøk sett í verk*

## Um svínakrím

- Svínakrím smittar millum menniskju á sama hátt sum vanligt krím
- Sjúkan kann viðgerast við medisini
- Út frá teimum upplýsingum, Statens Seruminstitut hevur í løtuni, eru allir danir og føroyingar líka móttakilig fyri nýggja slagnum av krími, tá tað er eitt nýtt virus.
- Eingin vandi er fyri at verða fongdur av nýggja H1N1-virusinum frá svínakjøti ella úrdráttum av svínakjøti.
- Svínakrím er eitt nýtt virus, ið smittar millum menniskju. Tað er enn ikki staðfest í Danmark, men fleiri danir verða kannaðir fyri sjúkuna. Tað er staðfest í Spania.
- Donsku heilsumyndugleikarnir vita enn ikki hvussu vandamikið svínakrím er. Í Meksiko eru fráboðaði ígerð í andaleiðina, lungnabruni og deyðsføll. Í USA og Kanada eru fráboðaði lin tekin um krím og einki deyðsfall.
- Statens Seruminstitut mælir til, at tú er ansin og fylgir lokalum tilráðingum, ferðast tú í londum, har svínakrím er staðfest hjá menniskjum.
- Heilsumálaráðharrin í ES, Androulla Vassiliou, mælir íbúgvum í evropeisku londunum frá óneyðugum ferðum til øki, ið eru ávirkaði av svínakrími.
- Sjúkan kemur upprunaliga frá svínum, harav navnið. Í svíninum eru ílegur frá menniskjakrími, fuglakrími og svínakrími blandað saman til eitt nýtt svínakrímsvirus týpa A H1N1.

*Kelda: Statens Seruminstitut*

# Svínakrím breiðir seg enn meira

**Tilburðir av svínakrími eru nú eisini staðfestir í bæði Ísrael og Ný Sælandi. Sostatt eru tveir nýggir heimspartar fongdir av svínakrími, umframt Norður- og Suðuramerika og Evropa**

SVÍNAKRÍM

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tilburðirnir av svínakrími halda áfram at breiða seg kring heimin.

Tíðliga í morgun komu boð av einum sjúkrahúsi í Tel Aviv í Ísrael, at ein tilburður varð staðfestur har. Eisini er ein tilburður nú staðfestur í Ný Sælandi. Sostatt er svínakrím nú staðfest í fimm av teimum sjey heimspørtunum.

Enn eru eingi deyðsføll av farsóttini uttanfyri Meksiko, men tilburðir eru higartil staðfestir í USA, Skotlandi, Spania, Ísrael og Nýsælandi, umframt at illgruni er um tilburðir í nógv fleiri londum.

Í USA eru 50 tilburðir staðfestir, seks í Kanada, tvey í Skotlandi, ein í Spania og ein í Moskva. Hetta fekk fyrr í dag heimsheilsustovnin WTO at hækka tilbúgvingarstigið til 4 á stiganum.

Nú eru tilburðir eisini staðfestir í Ísrael og Ný Sælandi.

### Verður tikið í álvara.

Myndugleikar kring heimin fylgja sera væl við gongdini. Danski forsætisráðharrin, Lars Løkke Rasmussen, gjørdi nógv burturúr svínakríminum á einum tíðindafundi í dag.

Hann mælti øllum dønum at taka tað við ró, og vissaði um at støðan er fullkomiliga undir tamarhaldi.

-Donskumyndugleikarnir hava sterkt eftirlit við hesi sakini, segði Lars Løkke Rasmussen á tíðindafundi í dag.

- Eg eri als ikki í iva um at danir stúra. Tað er tí er taki hetta upp. Spurningurin er so, um tað er heilsufaklig orsøk til at stúra tað stóra. Til tað vil eg siga, at soleiðis, sum mær er kunnugt, er metingin, at krímslagið, vit tosa um, er til at halda tamarhald á, sigur forsætisráðharrin.

Myndugleikar aðrastaðni í heiminum mæla ikki fólki frá at ferðast til londini, men biðja tey umhugsa ferðina og tilráðingin er ikki at fara, uttan at tað er neyðugt.

### Koppingarevni á veg

Í løtuni er einki koppingarevni móti svínakrími, ið er eitt heilt nýtt slag av virus, ið er sameint av fleiri ymiskum virusgenum. Í danska Sunheldsstyrelsen vænta tey, at tað fara at ganga 2 til 3 mánaðir, áðrenn ein koppseting er klár. Til tá verða sjúk viðgjørd við Tamiflu.

- Við at gera aggressivar royndi vóna vit at byrgja fyri smittubreiðsluni í Danmark, soleiðis at vit kunnu halda eini farsótt burturfrá og náa at fáa koppsetingina klára, sigur næstformaðurin í Pandemibólkinum hjá Sunhedsstyrelsen, Else Smith, við tíðindastovuna Ritzau mánadagin.

Í gjár segði landsapotekarin, Heri Mørkøre, við Sosialin, at Føroyar hava ríkiligt av heilivági móti slíkum sóttum, eisini Tamiflu, ið verður nýtt móti svínakrími.



*Her sæst hvar tilburðirnir av svínakrími eru staðfestir. Ljósareyðu merkini eru tilburðir undir illgruna. Vióblláu merkini eru staðfestir tilburðir. Gulu merkini eru avsannaðir tilburðir. Deyðsføll mangla prikki í miðjuni*